# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Vit rædast ongan. Tey, sum leypa á okkum, fáa eitt hóskandi mótálop.*

*(Mahmoud Ahmadinejad, iranskur forseti)*

# Risabýirnir kunnu enda í ruðuleika




*Lagos í Nigeria er ein av teimum býunum, sum er vaksin sera nógv tey seinastu árini*

**Meiri enn helmingurin av heimsins fólki búgva í býum, men summir býir veksa ov skjótt**

Ongantíð eru so nógv fólk flutt inn í teir stóru býirnar sum tey seinastu árini. Í altsamt fleiri býum fer fólkatalið upp um 10 milliónir, og tað hevur stórar avbjóðingar við sær.

Á einari ráðstevnu hjá Worldwatch Institute í gjár kom fram, at stórbýir sum Lagos í Nigeria og Nairobi í Kenya veksa so skjótt, at vandi er fyri, at alt endar í ruðuleika. Høvuðstrupulleikarnir eru fátækrabýarpartar, vatntrot, dálking, ferðsluóskil og eitt samferðslukervi, sum als ikki megnar at fylgja við tí veksandi fólkatalinum.

Worldwatch Institute sigur í einari nýggjari frágreiðing, at trupulleikarnir í býum sum Lagos og Nairobi eru so stórir, at altjóða politikarar noyðast at taka teir í álvara.

- Tey seinastu 20 árini hava vit tosað um veðurlagið, men eftir okkara tykki noyðast vit eisini at loysa teir ovurstóru trupulleikarnar, sum standast av, at heimsins fólk savnast í stórum býum, sigur nevndarformaðurin í Worldwatch Institute, norðmaðurin Øystein Dahle, við Aftenposten.

Worldwatch Institute sigur, at tað eru lond, sum hava megnað at loysa trupulleikarnar so hvørt, men at summastaðni eru teir so stórir, at tað kann enda við ruðuleika.

# Stórkavi í USA



Køld høgættarluft úr Kanada hevur gjørt, at sjáldsama nógvur kavi er komin niður í landnyrðingspartinum av USA seinastu dagarnar.

Tað hevur kavað serliga illa á leiðunum við tað stóra Ontario-vatnið á markinum millum USA og Kanada, og sambært sjónvarpinum CNN liggja fannirnar tættar í býunum Parish og Redfield.

Í Redfield er kavin hálvan fjórða metur tjúkkur, og so nógvur kavi er ikki lagstur har eftir einari viku, sum fólk minnast. Redfield er í statinum New York, og veðurmenninir har siga, at tað hevur ongantíð verið so nógvur kavi í statinum fyrr eftir bara einari viku.

Tey, sum búgva sunnan fyri Ontario-vatnið, eru annars von við nógvan kava, og veturin 1976-77 komu næstan 12 metrar niður í statinum New York. Tað er eisini tað mesta, veðurmenninir vita um, sigur CNN.

## STUTT SAGT

### Einki spart

Um eina góða viku fara viðhaldsfólkini hjá zimbabwiska forsetanum, Robert Mugabe, at hátíðarhalda, at forsetin fyllir 83. Í tí sambandi er ein ungdómsfelagsskapur farin undir at savna pengar til hátíðarhaldið, og sambært fjølmiðlunum er ætlanin at savna góðar sjey milliónir krónur. Hesin felagsskapurin varð stovnaður í 1986 og hevur til endamáls at gera nógv burtur úr forsetanum. Eitt nú skulu teir einstøku landspartarnir lata 375.000 krónur hvør, hóast teir í veruleikanum ikki eiga sýru í vegg. Eygleiðarar siga, at landsins búskapur er í fríum falli, og inflasjónin er um 300 prosent um árið. Kortini verður einki spart, tá Mugabe fyllir.

### Hótta byrging

Nógv bendir á, at Taleban fyrireikar seg til at søkja at einari sera týðandi byrging, sum veit elorku til ein stóran part av Helmanslandspartinum í Afghanistan. Guvernørurin í landspartinum sigur við Reuters, at meiri enn 700 hermenn hjá Taleban eru komnir um markið úr Pakistan, og at teir hava sett kós ímóti Kajaki-byrgingini. Sambært guvernørinum hevur Taleban fingið hjálp frá stuðlum í Pakistan, Usbekistan og Kekenia. Tað eru fyri tað mesta bretskir hermenn, sum hava støð í Helmand, men teir donsku hermenninir í Afghanistan hava eisini støð har.

### Fótbóltur gav børn

Í Týsklandi hava føðideildirnar á sjúkrahúsunum fingið ein trupulleika. Tað vísir seg, at óvanliga nógvar kvinnur skulu eiga í apríl, og tí hava føðideildirnar biðið um eyka seingjarpláss tann mánaðin. Læknarnir ivast ikki í, hví so nógvar kvinnur skulu eiga um somu tíð. Kvinnurnar eru vorðnar við barn, meðan HM í fótbólti var í Týsklandi seinasta summar, og tí verður roknað við, at dreingjabørnini fara at fáa nøvn sum Lukas (eftir Lukas Podolski), Bastian (eftir Bastian Schweinsteiger) ella Michael (eftir Michael Ballack).